# ÁLIT Í SAMBANDI VIÐ ENDURSKOÐAN AV LØGTINGSLÓG NR. 70 FRÁ 30. JUNI 1983 UM FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING V.M.

## INNGANGUR

Tað eru meir enn 6 ár síðani, at henda lóg kom í gildi, og kann tað nú, út frá teimum royndum, vit hava, vera hóskandi at gera nakrar viðmerkingar til lógina.

Í hesum sambandi sendi Hensar Ellingsgaard, landsskúlastjóri, í september mánað 1989 soljóðandi skriv út:

"Tilnevning í nevnd.

Tann 30. juni 1983 var løgtingslóg nr. 70 um frítíðarundirvísing v.m. sett í gildi. Nú lógin hevur virkað í 6 ár, vísir tað seg, at tað er ymiskt í lógini, ið krevur ábøtur, her verður serliga hugsað um 3. og 6. tátt í lógini. Tað eigur tí at verða umhugsað at gera nakrar neyðugar broytingar, so lógin kann vera lættari at umsita. Sambært tær heimildir, ið eru lagdar til Landsskúlastjóran, er avgjørt at seta eina nevnd, ið skal koma við uppskoti um lógarbroyting í omanfyri nevndu lóg.

Uppgáva nevndarinnar er:

1) Endurskoðan av 3. tátti við serligum atliti til stovnsetan og ábyrgd av skeiðum til royndarfyrireikandi undirvísing og bøtandi serundirvísing.

2) Endurskoðan av 6. tátti um fyrisiting, harímillum hvør skal leiða ta frítíðarundirvísing, ið verður sett á stovn í kommununi og eisini sum landsumfatandi undirvísing sambært § 15, 2. stk. Eisini eigur nevndin at koma við eini tilráðing um skyldur og heimildir leiðarans.

Heitt verður á nevndina at koma við einum áliti um áðurnevndu spurningar skjótast møguligt, so uppskotið kann verða lagt fyri løgtingið til staðfestingar í hesi setuni.

Tey, ið ætlað eru at verða við í nevndini, eru:

Kári Nolsøe Olsen, námsfulltrúi
Eyðfinnur Jacobsen, fulltrúi
Hanus Joensen, fyrstilærari og
Arnold Abrahamsen, námsfulltrúi

Tygum verða biðin um at vera limur í nevndini.

Skuldi tað av einari ella aðrari orsøk ikki borið tygum til at verið limur í hesi nevnd, verða tygum biðin um at gera so væl at siga frá til Landsskúlafyrisitingina, Falkavegi 6, 100 Tórshavn.

Um tygum taka við hesi tilnevning, verða tygum boðin til fundar týsdagin 10. oktober 1989 kl. 15.00 á Landsskúlafyrisitingini.

Hensar Ellingsgaard "

Í brævi, dagfest 19. september 1989, boðar Yrkisfelag Studentaskúla- og HF-lærara frá, at nevndarsamansetingin eftir teirra tykki er marghåttlig, tá ið kvøld-HF'ið er nakað av tí, ið fáast skal í rættlag, og sum eitt punkt í brævi teirra verður kravt, at teir fáa eitt umboð í nevndina.

Hesum ynski YF's gekk Landsskúlafyrisitingin á møti á fundi millum partarnar 22. september 1989, og varð Jákup Pauli Strøm, lestrarvegleiðari á kvøld-HF valdur at umboða YF sum 5. limur í nevndini.

Nevndin metir, at tær lógarbroytingar, ið skotnar verða upp í hesum áliti, eru til bata og nøktandi fyri at fáa løgtingslóg um frítíðarundirvísing at virka samsvarandi teim ynskjum, ið hava verið frammi frá ymsum síðum.

Nevndin hevur íalt hildið 8 fundir, og úrslitið verður hervið lagt fyri landsskúlastjóran til framhaldandi viðgerð.

Tórshavn, tann 2. mai 1990

Eyðfinnur Jacobsen — Jákup Pauli Strøm

Kári Nolsøe Olsen

[signature]

LÓG UM FRÍTÍÐARUNDIRVÍSING

Í sambandi við at hugsað verður um at endurskoða løgtingslóg um frítíðarundirvísing, verða her settar nakrar hugleiðingar fram um, hvussu lógin kundi fingið nakrar ábøtur, so hon var lættari at umsita, og á henda hátt kundi spart nakað av peningi, uttan tó at virksemið minkaði.

Vit hava eina lóg um frítíðarundirvísing v.m., ið er á hædd við tær bestu í hinum Norðurlondum. Tað verður tó treyðugt so, at ikki okkurt er at finnast at. Tíðir broytast, umstøður, ið ikki vóru, tá ið lógin var sett í verk, hava tikið seg upp. Lógin fevnir so vítt, at tað altíð vil vera okkurt, ein kundi hugsað sær øðrvísi.

Hvat almennari frítíðarundirvísing viðvíkur, so vaks hon ikki stórvegis, tá ið lógin um frítíðarundirvísing var sett í gildi í 1983. Lógin hevði tó nógv nýtt við sær, sum ikki hevði verið roynt áður sum frítíðarundirvísing í Føroyum. Her verður hugsað um 3. og 4. tátt í lógini.

**3. táttur** Sum kunnugt, so er 3. táttur í lóg um frítíðarundirvísing, serstøk frítíðarundirvísing, dýr undirvísing. Har verður undirvíst til fráfaringarroyndir fólkaskúlans og HF-stakroyndir. Lærararnir verða løntir eftir teimum sáttmálum, ið galda fyri viðkomandi undirvísing ella viðkomandi yrkisfelag.

**Stovnsetan** Sambært § 6 í lóg um frítíðarundirvísing eru tað kommunurnar, ið seta á stovn, og sjálvt um Landsskúlafyrisitingin í ein ávísan mun hevur møguleika at stýra, so sigur tað seg sjálvt, at tað kann skapa misskiljing, um Landsskúlafyrisitingin blandar seg ov nógv upp í, hvussu kommunurnar skipa síni viðurskifti. Tí eru teir møguleikar, ið Landsskúlafyrisitingin hevur at stýra, avmarkaðir. Hetta er ein spurningur, ið lætt kann elva til misskiljing.

**Leiðsla** Ein annar spurningur er leiðsluspurningurin. Sambært § 13 í lóg um frítíðarundirvísing er tað leiðarin av kommununar skúlaverki, ið hevur ábyrgd av at leiða frítíðarundirvísing í kommununi. Hetta er ein spurningur, ið hevur elvt til nógv kjak, síðan lógin kom í gildi. Skúlaleiðarin hevur í flest øllum førum havt leiðsluna av frítíðarundirvísingini um hendi, uttan at henda verður roknað upp í samlaða tímatal barnanna ella yvirtímatal skúlans.

Tá ið nevndin, ið gjørdi uppskotið til lóg um frítíðarundirvísing, vildi hava, at henda var beinleiðis knýtt at skúlanum, so var tað tí, at teir mettu, at øll frítíðarundirvísing fór fram í fólkaskúlanum, og serstakliga 3. táttur kom at seta krøv til fólkaskúlan. Tí var mett, at neyðugt var, at hesin hevði innlit í, hvat fór fram. Sjálvandi eiga skúlastjórarnir at hava innlit í ta undirvísing, ið fer fram í fólkaskúlanum, serliga tá ið hugsað verður um próvtøku o.a.

Leiðaraløn

Viðvíkjandi leiðaralønini, so er hetta ein spurningur, ið Landsskúlafyrisitingin ikki hevur havt møguleika at stýra nóg væl, og liggur vansin í sjálvari lógini.

Tá ið vit vita, at um 40.000 tímar verða lisnir sum almenn frítíðarundirvísing, um 3.000 tímar sum fráfaringarroyndir fólkaskúlans, og um 1,5 mill. kr. verða brúktar til HF undirvísing sum frítíðarundirvísing, so merkir hetta, at samlaða leiðaralønin fyri allar Føroyar liggur um 1,5 mill. kr.

<u>Neyðugt við broytingum</u>

Tað eru 3 punkt, ið eiga at verða tikin upp aftur til viðgerðar í lógini. Tey eru:

- stovnseting av serstakari frítíðarundirvísing

- leiðsluspurningurin

- lønin til leiðara

Um hugt verður eftir, hvussu hini Norðurlond skipa sína frítíðarundirvísing, so sæst, at tann almenna frítíðarundirvísingin verður fyriskipað av kommununi, meðan serstøk frítíðarundirvísing sum t.d. royndarfyrireikandi undirvísing og bøtandi serundirvísing verður fyriskipað av amtskommununi.

Til vanliga frítíðarundirvísing er lætt at fáa nóg stórar bólkar sjálvt í miðalstórum bygdum. Tað er bert í teimum smæstu bygdunum og í útoyggjunum, at undantøk verða givin. Tí er tað sjálvsagt, at tað eru kommunurnar, ið skipa fyri almennari frítíðarundirvísing, sum tær eisini hava umstøður til. Øðrvísi er við tí serstøku, og her kann fyrst verða tikin tann royndarfyrireikandi undirvísingin.

Fyri at fáa sett framhaldsskúlar á stovn, hevur verið neyðugt at skipa skúlasamband millum fleiri bygdir, fyri á tann hátt at fáa møguleikar at skipa undirvísingina í samsvar við tann tørv, ið er á hesi undirvísing, og at skapa grundarlag fyri einum næmingatali, sum er hóskandi.

Royndarfyrireikandi

Tað er tí enn meira neyðugt, at fleiri bygdir taka seg saman um at fáa sett á stovn royndarfyrireikandi undirvísing, tá ið talan er um undirvísing sambært § 6 í lóg um frítíðarundirvísing. Eindirnar undir einum kvøldskúlaskeiði til fráfaringarroyndir eiga at vera nógv størri enn tey verandi skúlasambondini. T.d. kundi hugsast, at í Eysturoynni var 1 skeið, í Norðuroyggjum 1, Vágar og Vestmanna arbeiddu saman um 1, Suðuroyggin 1. Torført verður at fáa nakað í gongd í Sandoynni, tí fólkatalið er ov lítið, men verða umstøður, og vísir ein tørvur seg at vera, so eigur sjálvsagt skeið at verða sett á stovn har.

Tá ið vit tosa um so stór skúlasambond sum omanfyri nevnt, so kemur tað av sær sjálvum, at trupulleikar fara at taka seg upp í sambandi við hesa undirvísing, tí hvør skal skipa fyri, og hvør skal hava ábyrgd av henni. Hetta eru spurningar, ið vit mugu fáa greiði á.

Vit hava í ávísum føri roynt eina skipan í Eysturoynni, har allir kvøldskúlaleiðararnir vóru samdir um at samskipa undirvísingina til fráfaringarroyndir fólkaskúlans sum frítíðarundirvísing. T.d. hevur verið undirvíst til fráfaringarroyndir í enskum í Fuglafirði og á Toftum, meðan undirvíst varð til víðkaða fráfaringarroynd í Leirvík. Á Toftum var undirvíst í rokning/støddfrøði. Reglurnar vóru, at haðani flest næmingar vóru, har varð skeiðið sett á stovn.

HF-stakroyndir

Sambært lóg um frítíðarundirvísing er eisini møguleiki fyri at undirvísa til stakroyndir, ið eru partar av HF-próvtøku. Til hesa undirvísing krevst enn størri grundarlag enn til fráfaringarroyndir fólkaskúlans, og kemur tað tí bert at vera møguligt at skipa hesa undirvísing í sambandi við tey verandi HF-skeiðini. Hetta ger seg galdandi bæði fyrisitingarliga og námsfrøðiliga. Tað er tó einki til hindurs fyri, at skeiðið sjálvt verður hildið aðrastaðni. T.d. kann HF-skeiðið í Hoydølum skipa fyri enskum í Vestmanna. Tað veldst bert um, hvaðani næmingarnir koma.

Tvey tey seinastu árini hevur HF-skeiðið í Hoydølum skipað fyri undirvísing í Vágum, og hava vit fingið ávísar royndir, hvussu henda undirvísing best kann verða skipað í framtíðini. Tað vísir seg m.a., at tað ber illa til uttan við hjálp frá fólki á staðnum.

Tey, ið ganga til HF stakgreinaundirvísing, eru ofta fólk, ið eru tilkomin og hava brúk fyri eini einstakari lærugrein, tí tey skulu søkja á ein ella annan skúla og hava brúk fyri einum HF próvtali í ávísari lærugrein. Nøkur søkja inn á hægri lærustovn, men hava ov lítið í onkrari lærugrein ella hava ikki tikið hana. Tey kunnu nú ganga á kvøldskúla fyri at fáa tað vantandi próvtalið og samstundis arbeiða um dagin. Onnur nýta møguleikan at taka eitt HF-prógv um kvøldið, tí tey arbeiða um dagin.

Sum sæst, fer fram ein víttfevnandi og virðismikil undirvísing, ið hevur verið til stórt gagn.

Bági

Ein bági við allari hesi undirvísing er tó, at tað eru bý/bygdaráðini, ið skipa fyri. Í flestu førum eru kommunurnar ov smáar til, at tær hava møguleika at skipa fyri serstakari frítíðarundirvísing. Av hesi orsøk kemur so lítið í gongd, og ofta verður tað dýrt, tí eindirnar eru ov smáar.

Sambært § 15, stk. 2 kann Landsskúlafyrisitingin seta á stovn landsumfatandi undirvísing. Tað er tó ikki greitt, hvør skal leiða hesa, men valla slepst undan, at tað er leiðarin av kommununnar skúlaverki, tí sambært § 13, 1. stk., so skal leiðarin av kommununnar skúlaverki leiða ta frítíðarundirvísing, ið verður sett á stovn í kommununi eftir hesi lóg. Lógin heimilar ongastaðni at leggja leiðsluna til annan enn leiðaran ella hjálparfólkið sambært § 13, 3. stk.

Tá ið HF-stakroyndir vórðu settar á stovn sum frítíðarundirvísing í Eysturoynni, kallaði Landsskúlafyrisitingin allar kvøldskúlaleiðararnar í oynni til fundar, har viðtikið varð, at rektarin við Studentaskúlan og HF-skeiðið í Eysturoy skuldi leiða henda part av frítíðarundirvísingini sambært § 13, 3. stk.

Landsskúlafyrisitingin letur 100% í studningi til tær studningsheimilaðu útreiðslurnar í sambandi við undirvísing, ið fer fram sambært § 6 í lógini, so sjálvt um undirvísingin ikki áleggur kommununum størri fíggjarligar byrðar, so er tað meira næmingatilfarið, ið er til

hindurs fyri stovnsetan av skeiðum. Tað vildi tí verið skilabest, um stovnsetan av skeiðum til fráfaringarroyndir fólkaskúlans og HF-stakgreinaundirvísing varð fyriskipað av Landsskúlafyrisitingini.

Sum nevnt frammanfyri hava vit eina lóg um frítíðarundirvísing, sum er á hædd við tær bestu í hinum Norðurlondunum. Vit hava tó ta minstu almennu frítíðarundirvísing av øllum Norðurlondum (í Føroyum luttaka 18% í frítíðarundirvísing, í Danmark 22%, í Svøríki 36%, í Noregi 20%).

Taka vit 3. tátt í lógini, so hava vit umleið eini 10-15% av tí, hini Norðurlond hava av royndarfyrireikandi undirvísing. Yrkiskenda undirvísing hava vit bert 5% av tí, teir hava í Danmark. Nakað tað sama er við serundirvísing sambært § 6, 3. pkt.

Serundirvísing

Eitt punkt, ið eisini eigur at verða umrøtt, er serundirvísing. Í rammulógini stendur, at serundirvísing kann gevast bæði sum fyrilitarlig og bøtandi serundirvísing, og í løgtingslóg um frítíðarundirvísing § 6, pkt. 3 stendur:

"Kommunurnar hava skyldu til at seta á stovn serstaka frítíðarundirvísing fyri íbúgvarar yvir 14 ár, sum fevnir um serundirivísing sambært § 5, 3. stk. í rammulógini."

Serundirvísing er, sum alt annað í 3. tátti, nýtt í føroyskari frítíðarundirvísing. Tað er stórur tørvur á serundirvísing fyri vaksin. Mong eru, ið sita heima við ymsum brekum og ikki fáa ta hjálp, tey hava rætt til. Eisini onnur, ið hava slík brek, at tey hava tørv á fyrilitarligari serundirvísing, hava nú møguleika at fáa undirvísing.

Samanumtikið kann viðmerkjast, at við løgtingslóg nr. 70 frá 30. juni 1983 um frítíðarundirvísing v.m., so hava vit fingið møguleikar at skipa eina frítíðarundirvísing á breiðum grundarlag.

Undirvísingin er komin væl í gongd. Umleið 8.000 fólk luttaka í almennari frítíðarundirvísing og umleið 1.000 í serstakari frítíðarundirvísing.

Uppskot um broytingar:

§ 6 Fyri at lógin skal virka eftir ætlan, er tørvur á at fáa broytt § 6.

Henda § fevnir um:

- royndarfyrireikandi undirvísing
- yrkiskenda undirvísing
- serundirvísing sambært § 5, 3. stk. í rammulógini

ad. royndarfyrireikandi undirvísing. Sum víst á frammanfyri, so er hetta undirvísing, sum krevur stórt fólkatal. Í einum so fjølbygdum samfelag sum Danmark er fólkatalið ikki nóg mikið í teimum smærru kommununum, at hesar megna at skipa fyri royndarfyrireikandi undirvísing, men er hon løgd til amtskommunurnar. Tað er tí ikki hugsandi, at kommunurnar hjá okkum hava møguleika at skipa fyri hesi undirvísing, so sum víst er á frammanfyri, tí fólkatalið er so nógv minni her hjá okkum. Vit eiga tí mest møguligt at hava eina samskipan fyri eyga, og eiga skeiðini at vera skipað á breiðum grundarlag.

Hugsast kundi, sum áður nevnt, at vit royndu at seta 6 skeið á stovn til fráfaringarroyndir fólkaskúlans í teimum ymsu umdømum. Tað eigur at vera Landsskúlafyrisitingin, sum skipar fyri hesum.

HF-undirvísingina eiga verandi studentaskúlar og HF-skeið at taka sær av. Hvar henda undirvísing verður sett á stovn, eiga skúlarnir sjálvir at finna útav. Tað veldst fyrst og fremst um næmingatalið, og hvaðani næmingarnir koma.

ad. yrkiskenda undirvísing. Yrkiskend undirvísing eigur somuleiðis at verða fyriskipað av Landsskúlafyrisitingini, tí her verður neyðugt við samráðingum við tey ymsu arbeiðsøkini. Hesi skeið verða altíð fá, roknast má við hægst 10 um árið, og verður arbeiðsbyrðan tí ikki so stór.

ad. serundirvísing sambært § 5, 3. stk í rammulógini. Sambært lóg um frítíðarundirvísing, ið aftur vísir til rammulógina, er møguleiki at skipa fyri fyrilitarligari og bøtandi serundirvísing. Her verður skotið upp, at Landsskúlafyrisitingin skipar fyri tí bøtandi serundirvísingini, tí henda serundirvísing, ið miðjar ímóti at bøta um brek næmingsins, krevur ráðlegging av sakkunnleika um tey ymsu brekini. Henda sakkunnleika hevur Landsskúlafyrisitingin

við teimum sálarfrøðingum og serundirvísingarráðgevarum, ið arbeiða her. Oftast er henda undirvísing einstaklingaundirvísing, og tí dýr undirvísing, ið krevur neyva ráðlegging, um hon skal geva tað úrslit, ið ætlanin er.

Øðrvísi er við tí fyrilitarligu serundirvísingini, her er tað fyrilit til brekið, ið er avgerandi, og tí ikki neyðugt við serligari ráðgeving og ráðlegging.

§§ 7 og 8

Til §§ 7 og 8 hava vit ongar viðmerkingar. Tað, ið vantar her, eru bert ávísar reglur til skipan.

§ 9

Um § 6 verður broytt, so slepst ikki undan eisini at broyta § 9, 3. stk. Tí í hesum stykki eru ásetingar um skyldu kommununnar at seta á stovn serstaka frítíðarundirvísing.

§ 13

6. táttur í lógini, ið fevnir um fyrisitingarligar reglur, krevur eina broyting, um so er, at tað skal vera lættari at umsita tann fyrisitingarliga partin av serstakari frítíðarundirvísing.

Sum nevnt í álitinum frammanfyri, so skapar tað trupulleikar, at tað er leiðarin av kommununar skúlaverki, ið skal leiða ta frítíðarundirvísing v.m., sum sett verður á stovn í kommununi.

## TILMÆLI UM LÓGARBROYTINGAR:

Út frá tí, sum er sagt frammanfyri, skjýtur nevndin upp hesar lógarbroytingar:

### Broytingaruppskot til § 6

Landsskúlafyrisitingin kann, har umstøður eru til tess, seta á stovn serstaka frítíðarundirvísing í tí vavi, tørvur er á, fyri íbúgvar yvir 14 ár.

Henda undirvísing fevnir um:

- royndarfyrireikandi undirvísing
- yrkiskenda undirvísing
- bøtandi serundirvísing

2. stk. Kommunurnar hava skyldu til í tí vavi, tørvur er á, at seta á stovn fyrilitarliga serundirvísing fyri fólk yvir 14 ár.

Broytingaruppskot til § 9, 3. stk.

Landsskúlaráðið ásetir reglur um, at skyldan at skipa undirvísing eftir § 6, 1. stk. skal lúkast við sjálvstøðugari stovnseting av undirvísing av hesum slag, við samarbeiði við aðrar kommunur, við ávísing til undirvísing í øðrum kommunum ella til kommunalar ella ikki kommunalar skúlar v.m.

Broytingaruppskot til § 13

Leiðarin av kommununnar skúlaverki skal eftir nærri reglum, sum Landsskúlaráðið hevur góðkent, hava eftirlit við tí frítíðarundirvísing v.m., sum verður sett á stovn í kommununi eftir reglum í hesi lóg, jbr. tó 2. stk.

2. stk. Eftirlitið við royndarfyrireikandi undirvísing á hægri stigi enn víðkaðu fráfaringarroynd fólkaskúlans hevur um hendi ein annar av Landsskúlaráðnum góðkendur leiðari.

3. stk. Við teir fólkaskúlar, ið skipa fyri frítíðarundirvísing, og har tað árliga tímatalið er meira enn 10.000, setir kommunan í samráð við skúlanevnd og skúlaleiðara ein frítíðarundirvísingarleiðara fyri í mesta lagi 3 ár í senn, ið skal skipa fyri frítíðarundirvísingini undir eftirliti skúlaleiðarans.

Verandi 2. stk. verður strikað
\- 3. stk. - -
\- 4. stk. - -
\- 5. stk. verður nýtt 4. stk.
\- 6. stk. verður nýtt 5. stk. og verður soljóðandi:

Landsskúlaráðið ásetir lønina hjá leiðarunum, frítíðarundirvísingarleiðarunum og lærarunum við frítíðarundirvísingina.

Fyrivarni:

Tá ið nevndin hevur skotið upp omanfyrinevndu lógarbroytingar, skal tó leggjast aftrat, at hesar broytingar viðføra, at ikki verður samsvar ímillum:

"Løgtingslóg um frítíðarundirvísing v.m." frá 30. juni 1983, "Løgtingslóg um skúlafyrisiting" frá 2. oktober 1978 og "Lov for Færøerne om fritidsundervisning m.v." (Rammulógin) frá 14. februar 1979.

Fyrisitingarlógin § 17 sigur, at "bygdarráðið/ býráðið skal syrgja fyri, at tað stendur borgarunum í kommununi í boði at fáa frítíðarundirvísing...", og í § 18 verður sagt, at "skúlanevndin ansar eftir, at frítíðarundirvísing og -virksemi í kommununi fer fram sambært galdandi reglum á hesum øki".

Nevndin hevur skift orð um, ein gongd leið kanska er at skriva til undirvísingarmálaráðið danska og greiða teimum frá, hvussu vit uppfata tingini, og hvat vit skilja við teir lokalu skúlamyndugleikarnar, og hava teir ongar viðmerkingar, má trupulleikin haldast at vera loystur.

Hin vegin stendur onki í rammulógini, hvat "den lokale skolemyndighed" er, men sum longu nevnt verður hetta í fyrisitingarlógini definerað sum bygdar- og býráð og skúlanevndin á staðnum. Spurningurin er tí, um tað ikki er nóg mikið við eini broyting í fyrisitingarlógini.

SKYLDUR OG HEIMILDIR LEIÐARANS.

Í tilnevningini í nevnd frá landsskúlastjóranum stóð at enda um uppgávu nevndarinnar:

> "Eisini eigur nevndin at koma við eini tilráðing um skyldur og heimildir leiðarans"

Skotið verður upp, at tann av Landsskúlaráðnum góðkendi leiðarin sambært broytingaruppskot nevndarinnar til §13 2. stk. hevur ta yvirskipaðu leiðsluna um hendi, og stendur við endaligu ábyrgdini yvirfyri skúlamyndugleikunum sambært løgtingslóg um skúlafyrisiting v.m.

Nevnda leiðsla er pædagogisk og administrativ og fevnir m.a. um hesi viðurskifti:

- gera endaligt tíma- og lærugreinabýti fyri skeiðið
- skipa fyri skeiðslýsingum
- skipa fyri starvslýsingum
- innstilla til størv, sum landsskúlaráðið setir
- seta onnur størv (tímalærarar, vikarar)
- taka upp næmingar
- skipa fyri, at frálæran fer fram eftir galdandi kunngerðum og galdandi tímatølum
- samskipa praktisk viðurskifti í samband við leigu/lán av hølum o.ø. við aðra kvøldundirvísing í bygdunum í økinum.
- skipa fyri prövtøkum, herundir skriva próvtøkuprotokollir, prógv, váttanir o.s.fr.
- fáa í lag neyðuga samstarvið millum lestrarvegleiðara, skrivstovu, umsitingarleiðara og lærarar annars.
- seta fráveruskipan á stovn. Meta um, samráðast og taka avgerðir, tá næmingar ikki fylgja frálæruni og annars skipa so fyri, at mannagongdin er røtt sambært galdandi reglugerð á hesum øki.
- støðugt at samstarva við skúlamyndugleikarnar um fíggjarlig viðurskifti skeiðinum viðvíkjandi.